# Taks hevur upplýsingarnar

Fleiri av borgarunum, sum hava vent sær til Taks við fyrispurningini um mvg av skrásetingargjaldi, hava fingið at vita, at Taks ikki hevur hesar upplýsingar. Men hetta er tó ikki heilt rætt. Tað er rætt, at Taks ikki hevur skrásetta meirivirsgjaldið av skrásetingargjaldinum. Men Taks hevur upplýsingar um skrásetingargjaldi av hvørjum bili sær. Tí skal borgarin biðja um upplýsingar um hetta. Og so annars rokna seg fram til meirvirðisgjaldið við at býta skrásetingargjaldi við fýra.



# Grotto-konsert í Klæmintsgjógv

Týsdagin verður grotto-konsert í Klæmintsgjógv. Hetta er seinasta konsertin á skránni hjá Summartónum í ár. Klokkan 13.00 fer Norðlýsið av Havnini við kós ímóti Hestoynni, har grottokonsert verður í Klæmintsgjógv, ið er eitt helli, sum gongur umleið 400 metrar inn undir Hestoynna. 250 metrar er siglandi inn, og 150 metrar ber til at ganga. Konsertir hava regluliga verið í Klæmintsgjóv síðani 1986, og konsertin týsdagin er tann seinasta á skránni hjá Summartónum í ár. Tað er Dávur Juul Magnussen, sum fer at spæla á trombone.



*Nú er líkt til, at bilasølur kunnu byrja at gjalda tær 120 milliónirnar, sum vórðu kravdar inn sum mvg av skrásetingargjaldi ímillum 1999 og 2005*

# Bilasølur kunnu gjalda út

**Taks góðtekur, at mvg av skrásetingargjaldi verður avroknað sum vanligt mvg. Tað merkir samstundis, at Taks góðtekur, at bilasølur endurrinda borgarum fyri ov nógv kravt mvg. Í alt er talan helst um á leið 120 milliónir krónur**

MVG
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kravdi landið 120 milliónir krónur inn í heimildarloysi í tíðarskeiðnum frá 1. mai 1999 til 28. apríl 2005? Tað er spurningurin, sum leingi hevur verið vendur, og har Taks ikki vil boyggja seg fyri hægsta fyrisitingarliga myndugleika.

Skatta- og avgjaldskærunevndin staðfesti longu á heysti 2006, at tað var ikki heimild at krevja mvg av skrásetingargjaldi á bilum. Ein orðing, sum stóð í lógini í oman fyri nevnda tíðarskeiði. Borgari kravdi á vári 2005 Taks eftir meirvirðisgjaldi, sum hesin metti stovnin hava kravt inn uttan heimild. Og á heysti 2006 gav Skatta- og avgjaldskærunevndin hesum borgara viðhald.

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur síðani staðfest, at avgerðir hjá nevndini skulu fylgjast, og at hesar avgerðir eiga at liggja sum grund fyri øðrum málum av sama slag, men hesum hevur Taks ikki aktað.

Vísandi til, at Taks var ósamt við nevndini vildi stovnurin í fyrsta umfari als ikki viðgera umsóknir frá borgarum um líknandi mál. Men tá Skatta- og avgjaldskærunevndin í vár staðfesti, at hetta hevði Taks ikki heimild til, varð Taks tvingað at taka onnur mál upp til viðgerð.

Men tað broytti tó ikki nevnivert um niðurstøðurnar hjá Taks. Í fyrsta lagi helt stovnurin fast um, at øll mál av hesum slag eru unik, og at avgerðir í einum máli tí ikki kunnu nýtast sum fordømi í líknandi málum. Hetta hóast málini snúgva seg um neyvt somu lógarviðurskifti.

## Svarið frá Taks

Síðani Taks fekk at vita, at málini skuldu viðgerast, eru fleiri svarskriv skrivað, og øll hava tey einsljóðandi aftursvar. Nevnliga at Taks metir hetta vera mál millum bilasølur og -keypara.

Sosialurin hevur tí spurt Taks, um stovnurin góðtekur, at mvg av skrásetingargjaldi verður viðgjørt á sama hátt sum vanligt mvg. Altso at bilasølurnar rinda hetta, fyri síðani at mótrokna hetta, tá mvg-uppgerð verður gjørd fyri hvønn ársfjórðingin.

»Taks metir, at heimild var at uppkrevja mvg av skrásetingargjaldinum í omanfyri nevnda tíðarskeiði, og harvið góðtekur Taks eisini, at hetta sølumvg'ið varð avroknað við landskassan.«

Soleiðis ljóðaði svarið, sum vit eftir tvey spurnarumfør fingu frá Taks, og tað merkir, at stovnurin góðtekur, um bilasølur endurrinda keypara mvg av skrásetingargjaldi, og at bilasølurnar síðani avroknað hetta í mvg-uppgerðum sínum.

## Fyrningarfreist

Hinvegin er framvegis ikki greitt, um svarið eisini merkir, at allir bilaeigarar kunnu fáa endurrinda ov nógv goldið meirvirðisgjald.

Her vísir Taks støðugt til fyrningarlógina frá 1908, har tað sum meginregla er galdandi, at endurgjaldskrøv fyrnast eftir fimm árum.

Vit hava annars spurt Taks, um tað er so, at virki missir rætt at rætta mvg-uppgerðir, tá hesar eru fimm ár. Um tað ikki eru aðrar umstøður galdandi, tá mistak er framt konsekvent í tíðarskeiði, sum fevnir um meira enn fimm ár. Og um hesi krøv ikki eru fevnd av regluni um, at fimm ára reglan ikki traðkar í gildi, fyrr enn borgari er vorðin varugur við mistakið - altso at fyrningarfreistin ikki byrjar fyrr enn á heysti 2006.

Men hesum hevur Taks ikki vilja svarað. Ikki annað enn, at víst verður til fyrningarlógina.

# Sjálvmál fyri 30 milliónir

**Við at halda fast um, at mvg av skrásetingargjaldi er eitt mál millum bilasølu og –keypara, hevur Taks dýrkað eitt møguligt mvg-endurgjald við einu fjórðingi**

MVG
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu á heysti 2006 tók Skatta- og avgjaldskærunevndin avgerð um, at borgari skuldi hava mvg av skrásetingargjaldi endurgoldið frá Toll- og Skattstovu Føroya, sum Taks tá æt.

Hóast Skatta- og avgjaldskærunevndin er hægsi fyrisitingarligi myndugleiki, so hevur Taks higar til noktað fyri at endurrinda mvg í líknandi. Og hóast Skatta- og avgjaldskærunevndin í vár staðfesti, at Taks skal fylgja tulkingunum, sum nevndin ger innan skatta- og avgjaldsøki, so noktar Taks framhaldandi at fylgja hesum.

Ístaðin hevur Taks støðugt hildi fast um, at tey viðgera hvørt mál sær, heldur enn at nýta gamlar avgerðir sum grundarlag. Hetta tí stovnurin ikki metir, at einstøku málini kunnu samanberast.

## Eykarokning

Men samstundis, sum Taks hevur nokta at fylgt ovasta fyrisitingarliga myndugleika, hevur stovnurin eftir øllum at døma eisini økt møguliga endurgjaldi við einum fjórðingini.

Skulu bilasølurnar endurrinda borgara fyri ov nógv kravt mvg av skrásetingargjaldi, so eigur sølumvg eisini at leggjast afturat hesi upphædd. Hetta tí bilasølan upprunaliga hevur lagt ov nógv sølumvg oman á endaliga prísin.

Sum hugsað dømi kann takast ein bilur, har mvg av skrásetingargjaldinum var 10.000 kr. Skal bilasølan endurrinda keyparanum hesar 10.000 kr., so skuldu hesar jú ongan tíð verið roknaðar upp í prísin. Og tá vildi prísurin uttan mvg verið 10.000 kr. lægri. Við øðrum orðum, so skal borgarin nú hava 12.500 kr. aftur frá bilasøluni, heldur enn at fáa 10.000 kr. aftur frá Taks.

Tað hevur verið ført fram, at samlaða mvg-upphæddin í málinum um mvg av skrásetingargjaldi, er um 120 mió kr.. Skulu hesar endurrindast umvegis bilasølurnar, verður samlaða upphæddin tí 150 mió kr. Tó við tí fyrivarni, at er talan um mvg-skrásett virki í keyparaleiklutinum, hevur eyka sølumvg'ið ongan týdning.